## Wosniacki vil á toppin

Eftir finaluplássið í US-Open er danska Caroline Wosniacki komin upp á sætta plássið á styrkislistanum hjá WTA. Men sjálv sigur Caroline, at hon vil røkka longur. – Eg havi realistiskar vónir til mín sjálvan, og so leggi eg ikki so nógv í, hvat onnur halda. Mítt mál er í øllum førum, at eg skal klára at vinna meg upp á fremsta plássið á listanum, sigur Caroline Wosniacki.



## Renault í Formel 1-gølu

Talan var um avtalað spæl, tá eitt krasj i grand-prix'num í Singapore í fjør tryggjaði Fernando Alonso sigurin í HM-kappingini. Nelson Piquet rendi á, tá 14 umfør vóru farin av kappkoyringini, og nú viðgongur Renault, at talan var um avtalað spæl, sum sendi safety'bilin á breytina í eini taktiskt týdningarmiklari løtu hjá Alonso.

NSÍ

Víkingur

**Víkingur spældi í 82 minuttir við einum manni í yvirtali, men tað eydnaðist teimum ikki at basa NSÍ, sum í Meinhardt Joensen og Christian Høgna Jacobsen átti størstu profilarnar á vøllinum**




Jákup Mørk



Christian Høgni Jacobsen staðfesti enn einaferð, at hann er glóðheitur í løtuni. Fýra mál í trimum dystum hava gjørt sítt til, at NSÍ framvegis hongur við í heiðursmerkjastríðnum

Mynd: Álvur Haraldsen

## NSÍ-Víkingur 2-1 (1-0):

# Broddur í Christian Høgna

Undan dystinum í gjárkvøldið hevði Víkingur havt eitt rimmar fast tak á NSÍ.

Síðani samanleggingina hevði Víkingur nevnliga fulla úrtøku móti vespunum, og eftir fyrstu átta minuttirnar var ikki nógv, sum bendi á, at tey hagtølini skuldu broytast.

Á miðjum vølli fór Johan Troest Davidsen nevnliga somikið hart í Zoltan Bukzegi, at dómarin ikki sá sær onnur ráð enn at finna reyða kortið fram, og so mátti NSÍ spæla í undirtali seinastu 82 minuttirnar.

### Dýrt mistak

Yvirtalið gav sjálvandi Víkingi eitt gott tak á dystinum, men teir megnaðu sjáldan at gerast veruliga vandamiklir. Partvíst tí ov lítil ferð var á spælinum, og partvíst tí Meinhardt Joensen í NSÍ-málinum rættiliga skjótt vísti, at hann veruliga hevði ein góðan dag.

Og tað gjørdi ikki uppgávuna lættari, at Geza Turi brádliga gjørdi av at spæla jólamaður, tá hann spældi bóltin út til Christian Høgna Jacobsen.

So stóð 1-0 á talvuni, og tað var ein leiðsla, sum runavíkingar fyri alt í verðini vildu verja.

Eftir steðgin økti Víkingur um trýstið, men hóast møguleikarnir nú eisini komu, so funnu teir ikki vegin fram við nú stórspælandi Meinhardt Joensen, og tá seinni hálvleikur var 20 minuttir gamal, gjørdi Christian Høgni aftur um seg. Hesa ferð var talan ikki á sama hátt um jólagávu, men tað legði áleyparin líka í, tá hann fyrst dróg um hálvan vøllin, áðrenn hann við vinstrabeini smekkaði í netið umvegis stólpan.

At Víkingur seinni minkaði um munin, tá Atli Gregersen var komin framvið, broytti einki um úrtøkuna fyri dystin, og eingin ivi er um, at heimenninir fagnaðust um sigurin. Bæði tí hetta var tann fyrsti móti Víkingi – men so sanniliga eisini, tí fortreytirnar í dystinum gjørdust somikið vánaligar.

### Europa dregur

Hjá NSÍ kveikti sigurin aftur lív í vónina um, at teir skulu út í Europa at spæla komandi ár.

Skal tað eydnast, so er kravið tó, at avrikini verða meira støðug seinastu tríggjar dystirnar, sum skulu tryggja teimum pláss frammi millum heiðursmerkjatakararnar.

Hjá Víkingi er Europa longu tryggjað, eftir at teir á ólavsøku vunnu steypafinaluna, men hetta tykist hava kosta í konsentratiónini um landskappingina, har víkingarnir hava verið sera óstøðugir seinastu umførini. Og ikki minst munnu teir iðra seg um laku úrtøkuna í dystunu móti KÍ, ÍF og 07 Vesturi. Stigamissir, sum hava kostað møguleikan fyri eini veruligari topp-plasering, og í so máta var dysturin í Runavík ein undirstrikan av veruleikanum, sum er, at Víkingur síðani summarsteðgin í ov lítlan mun hevur drigið smáu marginalarnar til egnan fyrimun.

## Dýr mistøk

Víkingarnir vóru vónbrotnir, tá teir noyddust av vøllinum við Løkin uttan stig. Fyrst og fremst hildu teir tó, at teir áttu ábyrgdina av tapinum sjálvir.

- Vit høvdu sjálvandi ætlað okkum trý stig, tá vit fóru á vøllin. Men vit gera tvey persónlig mistøk, og tey kostaðu okkum sigurin, segði Súni Olsen við Rás2 eftir dystin.

Tit vunnu 3-0 á EB/Streymi sunnudagin. Hvussu ber tað til, at umskiftið hjá tykkum varð so stórt og so negativt.

- Eg veit ikki. Teir fáa ein mann útvístan tíðliga í dystinum, men vit fáa kortini ikkis pælið at koyra. Vit koma til nakrar møguleikar við deyðbóltsstøður, men vit spæla snøgt sagt ov vánaligt.

- Fyri steðgin var viljin hjá okkum ov lítil, men tað batnaði eftir steðgin. Tá koma vit fram til eitt sindur, men vit eru ikki nóg hvassir, og so skal eisini sigast, at Meinhardt stendur ein fínan dyst, segði Súni Olsen eftir dystin.

-mørk

## Mín besti dystur

Dagsins maður hjá NSÍ var uttan iva Meinhardt Joensen í málinum, og hann var sum vera man væl nøgdur eftir dystin.

- Hetta var kanska mín besti dystur í ár. Har vóru í øllum førum nógvar vandamiklar støður, men sum heild spældu tær flestu væl av hjá mær.

- Vit høvdu ikki spælt nóg væl seinastu dystirnar, og avtalan var, at vit hesa ferð skuldu fara nógv meira heilhjartaðir undir uppgávuna. Og vit skuldu eisini venda gongdini, har vit hava mist ov nógv stig á heimavølli, og tað eydnaðist so fyribils, segði Meinhardt Joensen eftir dystin.

Fortreytirnar fyri dystinum broyttust munandi, tá NSÍ tíðliga misti Johan Troest Davidsen, og Meinhardt viðgekk eisini, at hetta gjørdi støðuna nakað tyngri.

- Tað verður sjálvandi nógv trýst, og vit detta sjálvandi longur aftur á vøllin, enn man vanliga ger. Men vit levera eitt sera gott liðavrik, og eg haldi, at vit allir spældu ein góðan dyst, segði Meinhardt Joensen.

-mørk